Álit

í

løgtingsmáli nr. 24/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Fleiri fráverudagar vegna sjúku afturrindast av arbeiðsgevara)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 29. september 2023, og eftir 1. viðgerð tann 6. oktober 2023 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. og 26. oktober og 9. november 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Føroya Arbeiðarafelag, Vinnuhúsið og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Árni Skaale, Johan Dahl og Kaj Leo Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Okkara uppfatan av einum vælferðarsamfelag er, at landið tekur sær av okkum, tá vit gerast sjúk. Fyriliggjandi uppskot rennur undan hesi meginreglu, tí nú vil landsstýrið senda rokningina til arbeiðsgevarar.

Frá, at vinnan "bert" hevur rindað fyri 2 teir fyrstu sjúkradagarnar, vil landsstýrið við hesum uppskotinum áleggja vinnuni at rinda fyri 7 teir fyrstu sjúkradagarnar.

Landsstýrið sigur seg vilja spara 13 mió. kr. við uppskotinum. Hetta er ikki rætt, tí her verður einki spart, men henda stóra rokning verður send til arbeiðsgevarar.

Fyri arbeiðsgevarar kann uppskotið fáa álvarsamar avleiðingar, serliga fyri smáar fyritøkur. Politikkur eigur at tryggja vinnuni góðar og støðugar karmar, men tað hevur sitandi samgonga ongan áhuga í.

Eisini er komið fram undir nevndarviðgerðini, at uppskotið kann fáa avleiðingar fyri fólk, sum av serligum orsøkum hava nógvar sjúkradagar. Sannlíkt er, at arbeiðsmarknaðurin fer at frávelja at seta hesi í starv. Hesar avleiðingar fara vit serliga at síggja, tá arbeiðsloysið aftur veksur.

Hetta er ikki einasta byrðan, samgongan leggur á okkara land og fólk. Í hesum føri ein stór rokning til vinnufyritøkur, sum eisini fáa eina røð av øðrum byrðum frá landsstýrinum at rinda.

Sitandi samgongan hevur eina rúgvu av avgjaldshækkingum og lítið skiljandi spariuppskotum. Bæði persónar og vinna standa fyri skotum.

Fyri persónar:

- Hækka bensin- og dieselavgjald
- Hækka brennioljugjald
- Hækka el-prísin

- Hækka kringvarpsgjaldið
- Minka stuðulin til avlamisbil
- Hækka egingjaldið á heilivág
- Tey allar lægstløntu fáa hópin av avgjaldrokningum, men ongan skattalætta. Harafturat velur samgongan at lækka teirra orkustuðul úr 12.000 kr. í ár niður í 5.000 kr. næsta ár
- Sum einasti bólkur er samtykt, at lestrarstuðulin ikki skal prístalsjavnast í 2024
- Útvald siglandi skulu, sum tey einastu, ið arbeiða heimanífrá, missa frádráttir.
- Sjómannafrádrátturin skal skerjast
- Og frádráttir hjá útisiglarum skulu takast burtur

Men:

- Vælbjargaði skulu hava stóran skattalætta
- Akademikarar hava í krónum fingið dupult so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar og Yngri læknar fáa tríggjar ferðir so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar
- Sendifólk skulu umframt serskipan av ovurstórari skattafríari viðbót fyri maka og børn, eisini hava barnafrádrátt

Fyri vinnuna eru rokningarnar stórar:

- 4-falding av toppskattinum á alivinnuna, sum longu hevur kostað 140 arbeiðspláss
- Munandi hækking av tilfeingisgjaldi á fiskivinnuna og teirra manningar, upp í 36% av landingarvirðinum, t.v.s. áðrenn hýrur og útreiðslur
- Revsitiltøk móti Russlandi, sum bara raka føroyska veitaravinnu og tað meint
- Hækka bensin- og dieselavgjald
- Hækka brennioljugjald á vinnuna úr 0 upp til 100 oyru/ltr.
- Hækka tungoljugjald
- Hækka el-prísin munandi á vinnuna
- Nýtt stórt avgjald á F-gass
- Vinnan skal rinda fyri 7 teir fyrstu sjúkradagarnar í mun til 2 nú
- Vinnan skal rinda størri part av løn til lærlingar, tá teir eru í skúla

Meirilutin heldur, at øll átøkini hjá landsstýrinum gera Føroyar til eitt samfelag, har munandi verri verður at reka vinnuvirksemi.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum til ikki at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Hans Jacob Thomsen, Súsanna Bertholdsen og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar:

Arbeiðsgevarar afturrinda í dag landskassanum fyri 1. og 2. fráverudag.

Hóast lógin er frá 2003, og tað fleiri ferðir hevur verið umrøtt í politisku skipanini at hækka arbeiðsgevaragoldnu fráveruna, er tað ongantíð gjørt.

Vit hava tvær ymiskar skipanir í Føroyum, har onnur skipanin er fyri tímalønt, og hin er fyri starvsmenn og tey, ið sambært sáttmála hava rætt til løn undir sjúku.

Fyri tímalønt er galdandi, at Almannaverkið rindar sjúkradagpening til arbeiðsgevaran, men at arbeiðsgevarin afturrindar fyri 1. og 2. fráverudag. Fyri starvsmenn og tey, ið hava rætt til løn undir sjúku, rindar arbeiðsgevarin fulla løn alt sjúkuskeiðið.

Minnilutin er samdur í, at tað er rætt at minka um tann ójavnan.

Um vit samanbera okkara skipan við skipanir í okkara grannalondum, kunnu vit eisini staðfesta, at tað áliggur arbeiðsgevarunum í okkara grannalondum at rinda fyri nógv fleiri sjúkradagar enn føroysku arbeiðsgevarunum.

Minnilutin ásannar, at størri broytingar kunnu hava ógvusligar ávirkan á dagliga raksturin hjá serliga smærri arbeiðsgevarum, og at tað tí eisini kann fara at raka løntakarar.

Minnilutin leggur tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður ”1. til og við 7. fráverudag” broytt til: ”1. til og við 5. fráverudag”.

Viðmerkingar
Við hesum broytingaruppskoti skal arbeiðsgevarin afturrinda fyri 5 teir fyrstu fráverudagarnar. Útreiðslur landskassans til dagpening vegna sjúka fara leysliga mett at lækka við uml. 8 mió kr.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 6. desember 2023

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstformaður	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	